# Ólavsøkuhald

## ein stuttsøga



Eg eri havnargenta, ein av teimum vanligu havnargentunum, ein gongur framvið dag og dagliga, á veg til arbeiðis, til døgurða, avstað aftur og so heim seinrapartin, men kvøldini eigi eg sjálv og kann gera við tey, hvat eg vil.

Ofta leiti eg mær út um býin, gangi og spáki uttan mál og mið, gleði meg yvir náttúruna, hoyri áartutli og droymi dreymar. Eitt summarkvøld eg komi niðan gjøgnum býin, merki eg málingaroyk nógva staðni frá, og ein maður uppi í einum stiga biður mær gott kvøld. »Naah, her skal pyntast«, sigi eg. »Ja, tað er fyri neyðini, eg fái hetta upp í lag. Tú, gott vit hava Ólavsøkuna, hon fær eitt sindur av futti í okkum«.

Allan vegin niðan eftir hugsaði eg um Ólavsøkuna. Ólavsøkan, hvussu nógv sigur hetta orðið ikki okkum føroyingum. Ja, tað sambindur okkum sum fólk, henda hátíð við øllum, hon rúmar, er okkara frá fyrndini av, og vit eiga hana øll. Hjá teimum gomlu vekjur hon ríkar kenslur og góð minni, hjá teimum ungu gleði og langtan. Og nú, nú skulu vit aftur at halda Ólavsøku.

Knappliga kemur tað til mín, hvussu heldur tú sjálv hesa hátíð? Um lív og heilsan verður tær lagað, og tú verður gomul og skuldi sagt yngri ættarliðum frá ólavsøkuhaldinum í tíni tíð, ja, so kundi tú sjálvandi roknað upp alt, ið var, men í hvussu nógvum vart tú sjálv við. Næstan ongum. Nú ádni eg við. Nei, den skomm, men »er slaget tabt, så er der tid at vinde et nyt«. Nú skal eg halda ólavsøku »ordiliga«.

Fyrst er at fáa fatur á eini ólavsøkuskrá, síðan sigi eg teimum heima frá ætlan míni og samstundis, at eg ikki eti hjá teimum, men fari til mostur.

Mamma vil vita hví. »Sum tú ert tornom, mamma, fatar tú ikki, at eg ætli mær at vera leys, so eg kann rýma beinanvegin, máltíðin er liðug«.

Svarið kom turt: »Tað ert tú von til, so et tú bara her, mostur hevur nokk at gera.«

Tá man ikki skal svara mammu síni aftur, so helt eg mær, men beiggjarnir vóru so spontskir, at teir bóðu meg fara á Hafnia at búgva, sjálvandi vildi eg fegin tað, men tað er ógjørligt at fáa innivist hesar dagarnar.

Eg gleddi meg sum eitt barn til 28. juli. Endiliga: Ólavsøkuaftan.

### I punkt á skránni: Ólavsøkan sett

Býráðsformaðurin setur ítróttarstevnuna. Í stívasta pussi fari eg niðan á Vaglið. Fløggini veittra, veðrið er av tí fagrasta. Hópur av fólki og hornblásturin ljóðar. Øll koma í veitslulag. Nú kemur skrúðgongan. Nei, ein føgur sjón at síggja allan henda vakra og fríska ungdómin koma marcherandi. Hann hugtekur øll og eisini hin hvíthærda býráðsformannin, sum stendur á røðarapallinum. Góð orð hevði hann til ítróttarungdómin, ja, eg helt, tað var so gott, at eg bað hann geva mær røðuna, og her er hon:

Í øldir hevur Føroya fólk komið til Havnar at halda ólavsøku og soleiðis eisini í ár og vónandi í alla framtíð, so leingi fólk býr á hesum oyggjum.

Ólavsøkan hevur nakað dragandi við sær – hon stendur yvir øllum – hon hevur fest seg í Føroya fólk.

Vit hava lindi til at spjaða okkum, men eitt standa allir føroyingar saman um, tað er Ólavsøkuna – sum er tjóðarhátíð okkara. Ólavsøkan var at byrja við ein kirkjulig hátíð, men tað er onki at ivast í, at hon næstan beinanvegin fekk ein verðsligan dám, við tað at okkara gamla ting varð sett henda sama dag.

Aftrat at vera kirkju- og fólkahátíð, er í okkara døgum ítrótturin vorðin ein høvuðstáttur í ólavsøkuhaldinum. Ja, kanska tann størsti.

Ein hópur av fólki kemur til Havnar á Ólavsøku at kappast í ítrótti – ella at síggja hesar kappingar. Hetta setur sín stóra dám á hátíðina, og tí ræður um hjá ítróttarfólkinum, at hesin dámur verður soleiðis, sum tað sømir seg fyri eitt mentað fólk og rættar ítróttarmenn.

Drívkraftin í øllum ítrótti er kappingin, men hon má vera so, at ikki illstøða stendst av henni – tvørturímóti eigur ítrótturin at skapa vinskap mann og mann – bygd og bygd ímillum.

Jú størri part av ólavsøkuni ítrótturin tekur, størri verður ábyrgdin hjá ítróttarfólkinum fyri eini væleydnaðari hátíð.
Ítróttarfólk av bygd og bý verið hjartaliga vælkomin til hesa ítróttarstevnu.
Eg vil enda við einum ørindi av Jóannes bónda Patursson:

*Ungligar, sum fylkjast her,*
*minnist væl hará.*
*Tvinnar eru gøturnar,*
*onnur víkir frá.*
*Búgvið tykkum her tí væl*
*vegna fosturlands frama til at standa í stríði.*
*Berið reinan skjøldin og æruna ta friðu.*
*Búgvið tykkum tí so væl.*

Við hesum orðum vil eg lýsa ítróttarstevnuna á ólavsøku nítjanhundrað fimti og – byrjaða.

Kappingin dunaði og hornbasturin spældi eina løtu.

### II punkt: Kappróðurin

Tað var ein øðilig gonga, sum av Vaglinum og aðrastaðni frá leitaði oman á bryggjuna. Eg eri so heppin at fáa sess ytst úti á skinnaraskeri. Ein drúgv løta er, áðrenn bátarnir eru komnir á pláss, men keðiligt er ikki at bíða. Tað er blikalogn og heilt klárt. Allastaðni, har eyga røkkur, eru fólk, kappróðurin dregur sum onki annað, og vakurt er tað eisini at síggja allar hesar nógvu bátar koma rógvandi, næstan tann vakrasti parturin av øllum ólavsøkuhaldinum. Eg hyggi yvir móti Tinganesi, tað stendur á tremur av fólki. Tinganes, hvussu mundi tað síggja út, tá tingið varð sett her fyri øldum og aftur øldum síðani. Mundi landsins kosnu mett tá kjakast eins og teir gera nú.

Mundi løgmaður hava líka nógv stríð av



limunum sum okkara nú. Eitt er vist, konurnar hjá tingmonnunum fyrr í tíðini høvdu tað í einum føri nógv lættari enn konurnar nú.

Tá vóru ongir politiskir valfundir, hesir ræðuligu fundir, har tað oftast eru valevnini sjálvi, ið eru til viðgerðar, og ikki flokksstevnuskráirnar. Har menn alment fáa sálarligar fleingir, meðan áhoyrararnir stuttleika sær, og ætt og vinir særast meint. Hevði tað verðið øðrvísi um kvinnur vóru við, skal eg ganga út frá mær sjálvari, má svarið verða nei, tíverri.

Nú byrjar kappróðurin. Sum øll eru spent; tey flestu ynskja, at teirra skulu verða fremstir ella fremstar, og summastaðir stendst orðadráttur av hesum, og tað gongur ikki altíð líka spakuliga av, serliga málreystur eru teir, sum longu hava kenningina, teir vilja ikki lata sær bjóða alt, men veruleikanum mugu øll boyggja seg fyri, og tá liðugt er, fara vit avstað, nógv errin og glað, onnur kedd, men í hvussu er, ongin vildi verið kappróðurin fyri uttan. Ja, tíðirnar broytast, einaferðina var árabáturin av allar allar størsta týdningi hjá okkum.

Forfedrar okkara átti onki annað. Við honum fóru teir út á havið at vinna veiðu. Við honum varð farið í læknaørindum. Nú hava vit øll nýmótans skip, telefon, sjúkrahús, men kanska vóru forfedrarnir tryggari í teirra dagligu veru enn vit, tí teir høvdu Guð við sær allastaðir. Teir livdu og doyðu í hesum: Forløg míni eru í tínum hondum.

### III punkt: Gamlir skúlakennigar

Tummas, Jóannes, Páll, Ása og Hervør; tey vilja vita, hvar eg fari. »Niðan á plenina«. Hurðin upp: Kom inn, kom inn, vit skulu eisini niðan, men bilsin eru tey yvir meg, og eg má so út við ætlan míni.

»Óført, vit skulu nokk taka okkum av tær, so tú fært eina minnirika ólavsøku«.

Sum eg keði meg uppi á plenini, veit onki um fótbólt og ætli mær so smátt omanaftur, men so komi eg at hoyra nakrar Havnarmenn tosa, nei, eg meini skelda.

Sum teir eru óðir inn á HB. Teir nytta onki, duga ikki til nakað, ongin av teimum, góðir til burturkast.

So rópa teir á teir ymsu spælararnar: »Kom nú, kom nú, hinir gomlu, saa, saah, ansa tær, ansa tær, sært tú ikki handa klaksvíkingin, aah, din dummi hundur, aah, títt klss«. Teir næstan gráta, meðan teir lata tað regna yvir HB. Sum gott havnarfólk vildi eg ynskt, at HB var líka raskt við beinunum, sum hesir góðu menn við mussaskøðnum. Teir liva so við í spælinum, at teir sparka, sum var tað teir, ið høvdu bóltin. Nei, hygg har. HB fær mál, og ein havnarmaður, sum stendur við tveimum smádreingjum, ein í hvørjari hond, skal klappa, og so íðin er hann, at hann gloymir alt uttan um seg, og brestir dreingirnar saman, hesi ólukkudýrini gráta sum stungnir. Pápin er illa við og roynir at troysta, øll rundan um flenna.

Sum eg havi tað stuttligt. Bert spell, eg skuldi havt ein bandupptakar við; tá hevði onkur gjørt eygu, um tey hoyrdu hesar »verdugu« havnarborgarar, sum til dagligt ganga so stillir í havnargøtum, verið so heitar og illar inn á sínar egnu. Jú, sig ikki, tað er futt í Havnarmonnum. KÍ vann.

»Nú fara vit til kabarett« sigur Jóannes, men Hervør vil heldur hava nátturða og so aftaná til kabarett.

Jú sigi eg, komið heim við mær til náttturða. Tit eru hjartaliga vælkomin.

Tey takka, vilja eiga tað til góðar eina aðra ferð. Eg veit væl hví. Pápi eigur ongan løgg at bjóða.

Endin verður at vit keypa okkum pylsur og so inn í sjónleikarhúsið.

Aftaná fara vit við Pálli. Har fáa vit kaffi. Tosið gongur, vit hava so nógv at spyrja um og fortelja frá, hava ikki sæst í eitt ár. Kabarettin er eisini til viðgerðar, og gomul felags skúlaminni eru mong.

So út aftur og inni í eini hús, eg aldri havi verið inni í fyrr. Eg skammist og tori illa inn, men konan er bæði blíð og týð og sigur, at á Ólavsøku gongur ein allastaðni og melur: »Kom nú bara inn Elin, so skalt tú fáa stoktan fisk frá mær«. Hoyrdi eg beint, jú hon stendur yviri við komfýrin og steikir. Og hvat er hetta. Mitt á gólvinum í køkinum stendur eitt fínt klaver. Hvat í allari víðu verð, eri eg í ørviti? Nei, eg drekki ikki ein gang vín.

»Vit flutt inn higar í gjár«, sigur konan. »Góðu tit komi og hjálpi mær at fáa klaverið inn í stovuna. Tá tað er gjørt, fara vit at eta fiskin við musikki til«. Konan spælir á klaverið fyri okkum.

Vit takka fyri okkum og leita heim í býin. Tey ætla sær í føroyskan dans, og eg ætli mær til hús, tó so lætt sleppi eg ikki.

»Tú skalt við okkum ikki talan um annað«. Eg royni at bera meg undan, leggi ikki í dans, eri so móð eisini. Nú seta tey á meg, og tað er ikki smávegis: »Ver bara sonn, tú heldur tað er synd at dansa, veitst tú ikki, at tey dansaðu í Gamla Testamenti. Jesus var sjálvur gestur í einum brúdleypi og meira enn tað, hann gjørdi vatn til vín. Vit eru sett í heimin at liva, liva fatar tú ikki tað? Gleða okkum, meðan vit kunna«. Tey halda áfram. Nú er øðin komin í meg. »Hví halda tit tykkum altíð til bíbliuna, tá tit skulu hava onnur at dansa og drekka? Hví brúka tit ikki hana í øðrum førum og liva eftir henni? Til dømis tit banna so illa, og allíkavæl sigur bíblian okkum, at tala okkara skal vera ja, ja og nei, nei, og brúka vit sterkari orð, so er tað av tí ónda. Hon sigur eisini: Søkið fyrst Guðs ríkið. Og hvat ger menniskjan, næstan alt annað enn hetta«.

Eg fái ikki sagt meira. Tey loypa á meg frá ølum síðum og teppa meg, og hetta ræðuliga kjakið endar við, at tey siga: »Tað er ikki fyri Várharra, at tú ikki torir at í dans, men tú ert bangin fyri teimum í KFUK.«

Eg mótmæli harðliga: »Tær uppi í KFUK nokta okkum ikki at dansa. Tað mega vit sjálvar um. Tær royna at vísa okkum vegin til Guð og fáa okkum inn á hann, læra okkum alt gott, onki annað«. Tey byrja av nýggjum, og eg hoyri meg sjálva siga: »Eg skal vísa tykkum, at tit hava órætt, eg komi við tykkum í sjónleikarhúsið«.

Troðkandi og skumpandi eydnast tað okkum at koma innar. Tað er fult av fólki, sum sild í tunnu. Hitin er øðiligur, og dansurin líkist ongum. Her er onki at gera uttan at sleppa sær útaftur. Meðan »stríðið í Runsival« dunar, berji eg meg út. Sum tað er frískt uttanfyri. Nú kann eg anda ordiliga.

Spakuliga fari eg oman gjøgnum Tórsgøtu. Á Bryggjubakka støðgi eg á og hyggi at kirkjuni, okkara vakra gamla kirkja, Harrans hús. Fjart hoyrist dunið frá mannamúgvuni á Vaglinum, men her er stilt og friðarligt og fjálgt. Ólavsøkan, kirkjuhátíð okkara; fimm korter av øllum haldinum geva vit tær, søkið fyrst Guðs ríkið. Eg má sláa eyguni niður sum tollarin á sinni í templinum og biðja Guð náa meg arma syndara, sum eg eri komin lítið ávegis, og sum eg føli meg dálkaða. Ikki tí at eg havi verið í dansinum, men tað var hetta ræðuliga kjakið. At eg skuldi bera meg so ljótt at. Fara at brúkast um bíbliuna, og hvør eri eg, at eg kann seta meg sum dómara yvir onnur, aah, sum eg angri. Hevði bara kirkjan verið opin nú, so hevði eg leita inn. Men Guð er allastaðir at finna. Um tú vilt biðja, so fær inn í kamar títt og bið til Faðir tín, sum er í loyndum, og Hann vil svara tær. Fer tað nakrantíð at eydnast mær at fáa svar?

Best er at fara víðari út á Reyn. Komin innar, fari eg í køkin at fáa mær ein kaffimunn. Sum mamma kennur meg væl. Á kaffikannuni hongur ein seðil:

»Góða Elin!

Seint í kvøld komu Malena og Sakaris. Eg mátti geva teimum kamarið hjá tær, so tú mást fara til Honnu-mostur at sova, í kamarinum til gongina.

Jógvan er eisini her og hevur spurt eftir tær. Hvar gongur tú og melur?

Vinarliga Mamma!«

Jógvan her. Sum eg eri kedd, at eg ikki havi verið heima í kvøld. Tað var stórt spell. Í morgin skal eg nokk verða inni.

Eg eri so móð, at eg orki ikki avstað. Hyggi inn í stovuna. Ongin liggur á divanini, so fari eg upp á loftið at vita, um tað eydnaðst mær at fáa fatur á soviposanum. Ongin er komin á kamarið hjá mær, eg inn, lati hurðina til vaðingina upp og krúpi innar og finni posan. Við honum í føvninginum komi eg knappliga at hugsa um Jógvan. Hví mundi hann vera komin so seint og onki sagt frammanundan.

Kundi hann hava onkra gentu her? Nei, nei. Nú hoyri eg tos og tað verður bølamyrkt. Hurðin til vaðingina verður afturlatin. Nú siti eg mitt í tí. Banka vil eg ikki.

